**Hanna Jensen**
**Ruth Vang**
**løgtingsmenn**

Løgtingið

**Løgtingsmál nr. 53/2018: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um sjófeingi**
(Útseta kvotuskipan til 1. januar 2020)

**Uppskot til**

**Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um sjófeingi**
(Útseta kvotuskipan til 1. januar 2020)

**§ 1**

Í løgtingslóg nr. 161 frá 18. desember 2017 um sjófeingi, sum broytt við løgtingslóg nr. 33 frá 20. apríl 2018 verða gjørdar hesar broytingar:

**1.** Í § 10, stk. 1, 2, 3 og 11 verður "1. januar 2019" broytt til: "1. januar 2020".

**2.** Í § 16, stk. 2 verður "2018" broytt til: "2019".

**3.** Í § 17, stk. 1 verður tvær staðni "2018" broytt til: "2019" og í stk. 3 verður tvær staðni "2019" broytt til: "2020".

**4.** Í § 22, stk. 1 verður "1. januar 2019" broytt til: "1. januar 2020".

**5.** Í § 23, stk. 1 verður "1. januar 2019" broytt til: "1. januar 2020", í stk. 5 verður "2018" broytt til: "2019" og í stk. 6 verður "árslok 2018" broytt til: "árslok 2019".

**6.** Í § 24, stk. 1 verður "1. januar 2019" broytt til: "1. januar 2020".

**7.** Í § 26, stk. 1 verður "1. januar 2019" broytt til: "1. januar 2020".

**8.** Í § 27, stk. 1 verður "1. januar 2019" broytt til: "1. januar 2020" og í stk. 2, 3, 4 og 5 verður "árslok 2018" broytt til: "árslok 2019".

**9.** Í § 29, stk. 1 verður "árslok 2018" broytt til: "árslok 2019".

**10.** Í § 41, stk. 1 og 3 verður "1. januar 2019" broytt til: " 1. januar 2020".

**11.** Í § 41, stk. 2 verður aftan á "2018" sett: "og 2019".

**12.** Í § 42, stk. 1 og 3 verður aftan á "2018" sett: "og 2019".

**13.** Heitið á kapitli 16 verður orðað soleiðis: "**Fiskidagaskipan í føroyskum sjógvi í 2019"**

**14.** Í § 73, stk. 1 verður tvær staðni "2018" broytt til: "2019".

**15.** Í § 74 verður stk. 2 strikað.
Stk. 3-12 verða eftir hetta stk. 2-11.

**16.** Í § 74, stk. 4, 1. pkt. (sum eftir hetta verður stk. 3, 1. pkt.) verður "1. september 2017 til 31. desember 2017" broytt til: "1. september 2018 til 31. desember 2018".

**17.** Í § 74, stk. 4, 2. pkt. (sum eftir hetta verður stk. 3, 2. pkt.) verður “2018” broytt til: “2019” og “í tíðarskeiðinum 1. september 2017 til 31. desember 2017” verður broytt til: “í tíðarskeiðinum 1. september 2018 til 31. desember 2018”.

**18.** Í § 74, stk. 7, 1. pkt. (sum eftir hetta verður stk. 6, 1. pkt.) verður “2018” broytt til: “2019”.

**19.** Í § 74, stk. 8 (sum eftir hetta verður stk. 7) verður “1. januar 2018 til 31. desember 2018” broytt til: 1. januar 2019 til 31. desember 2019”.

**20.** Í § 74, stk. 9 (sum eftir hetta verður stk. 8) verður “1. apríl 2018” broytt til: “1. apríl 2019” og “stk. 8” verður broytt til: “stk. 7”.

**21.** Í § 74, stk. 10 (sum eftir hetta verður stk. 9) verður “stk. 9” broytt til: “stk. 8”.

**22.** Í § 74, stk. 11, 1. og 6. pkt. (sum eftir hetta verður stk. 10, 1. og 6. pkt.) verður “stk. 8” broytt til: “stk. 7”.

**23.** Í § 74, stk. 11 (sum eftir hetta verður stk. 10) verður tríggja staðni “1. september 2016 til 31. august 2017” broytt til: “1. januar 2018 til 31. desember 2018”.

**24.** Í § 78, stk. 1 verður “31. desember 2018” broytt til: “31. desember 2019”.

**25.** Í § 79, stk. 1, 1. pkt. verður tvær staðni “2018” broytt til: “2019” og í stk. 2 verður “1. september 2016 til 31. august 2017” broytt til: “1. januar 2018 til 31. desember 2018” og í stk. 3 verður tvær staðni “2018” broytt til: “2019”.

**26.** Í § 80, stk. 1 og 3 verður “2018” broytt til: “2019”

**27.** Í § 90, stk. 1 verður 2. pkt. orðað soleiðis: “Tó koma § 15, stk. 1, nr. 5 og 6, og stk. 2 galdandi fyri nr. 5 og 6 í gildi 1. januar 2019.”

**28.** Í § 90, stk. 1 verður aftan á 2. pkt. sum nýtt pkt. sett:
“Ásetingarnar í § 10, §§ 22 til 27 og §§ 29 til 32 koma í gildi 1. januar 2020.”

**§ 2**

Henda løgtingslóg kemur í gildi 1. januar 2019.

**Almennar viðmerkingar**
Orsøkin til uppskotið er, at enn er arbeiðið at meta um fyrimunir og vansar við kvotum mótvegis fiskidagaskipan ikki liðugt, og bæði vinnan og politiska skipanin eru komin til tað vegamót, at tíðin er úti fyri at seta munandi broytingar í verk í høvuðsvinnuni við rímiligari umhugsanar- og fyrireikingartíð og fyri virðing av ymisku pørtunum.

Tá lóg um fyrisiting av sjófeingi varð samtykt 12. desember í 2017, var grundarlagið undir spurninginum um kvotuskipan/fiskidagaskipan hendan, sum sæst í álitinum frá samgongulimunum í Vinnunevndini*: "Landsstýrismaðurin hevur boðað frá, at í sambandi við arbeiðið at gera umsitingarætlanir fyri botnfisk undir Føroyum, sum skal gerast í 2018, verður eisini gjørd ein neyv eftirmeting av greinunum um at fara frá fiskidøgum til kvotur, har tey møguligu ivamálini verða lýst og viðgjørd nærri. Hetta arbeiði eigur at verða sett í gongd beinanvegin í 2018, og eigur at fevna um gjølliga eftirmeting av býtinum, undir hesum eisini hvussu fiskidagar í royndarloyvum, sum sambært lógini kunnu umleggjast til langtíðarloyvi, skulu takast undir daga-/kvotuskipanina. Mett eigur eisini at verða um fyrimunir og vansar við kvotum mótvegis fiskidagskipan..."*

Hesar treytir eru ikki uppfyltar, nú vit eru komin til endan á oktober mánaði, og høvuðsvinnan enn eingi boð hevur fingið um tær niðurstøður, hetta fyrireikingararbeiði hevur, og heldur ikki politiska skipanin er kunnað um, hvussu langt hetta arbeiði er komið.

Tí er rætt og rímiligt, at gildiskoman av hesum parti av lógini verður útsett enn eitt ár, so arbeiðið við hesum týdningarmikla spurningi fær ta rúmd, tað eigur at fáa, eins og arbeiðsnáðir.

**Serligar viðmerkingar**
<u>Til § 1</u>
Kvotuskipanin, ið eftir ætlan skuldi koma í gildi 1. januar 2019 verður útsett til 1. januar 2020. Fyri árið 2019 verður fiskidagaskipanin, sum hevur virknað fyri 2018, galdandi, og við somu treytum sum í verandi ári. Umframt hetta eru ymiskar tekniskar tillagingar í hesum sambandi.

<u>Til § 2</u>
Lógin kemur í gildi 1. januar 2019.

**Á Løgtingi, 24. oktober 2018**

Hanna Jensen    Ruth Vang